# Bygnaðarbroytingar í Heimamissiónini




*Heimamissiónin fremur bygnaðarbroytingar. Vagn Foldbo aðalskrivari verður leysur av nøkrum uppgávum, so at hann kann leggja størri dent á millum annað starvsfólkarøkt*

**Ætlaðu bygnaðarbroyting-arnar í Heimamissiónini, sum fyrr eru lýstar í Sosialinum, fara at virka frá 1. januar 2007. Tá verða starvsfólkini skipað í tvær deildir, eina boðanardeild og eina samskiftisdeild**

HEIMAMISSIÓNIN
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Broytingarnar skulu frígeva orku hjá aðalskrivarinum, so at hann kann fáast við aðrar uppgávur. Millum annað verður hugsað um starvsfólkarøkt. Broytingarnar fara at virka í byrjanini næsta ár.
Á heimasíðuni hjá Heima missiónini skrivar Vagn Foldbo, aðalskrivari, so leiðis um broytingarnar:

### Aðalskrivari

Aðalskrivarin verður fram haldandi dagligi leiðarin hjá rørsluni. Hann fyrireikar mál til Høvuðsstýrið og fremur tað, sum har verður samtykt. Eisini fer aðalskrivarin at hava ábyrgd av sambandinum millum landsarbeiðið og staðbundnu arbeiðini. Starvsfólkaleiðslan verður løgd út á deildarleiðararnar.

### Deildarleiðari á boðanardeildini

Deildarleiðarin á boðanardeildini verður leiðari hjá øllum trúboðarunum, bæði heima og úti. Eisini skal hann leiða barna- og ungdómsráðgevan eins og staðbundnu skrivararnar. Øssur Kjølbro verður starvsfólkaleiðari fyri tey 11 fólkini á boðanardeildini. Deildarleiðarin á boðanardeildini verður varaaðalskrivari.

Deildarleiðari á samskiftisdeildini
Umframt fíggjarleiðari verður Jørmund Foldbo leiðari á samskiftisdeildini. Hann skal vera starvsfólkaleiðari hjá blaðstjóra, blaðfólki, layoutfólki, forlagsleiðara, fyristøðufólki og skrivstovufólki.

### Visjón

Okkara visjón er at møta menniskjum, har tey eru. Vit vilja við bygnaðarbroytingunum fegin møta okkara starvsfólkum betri, har tey eru, eins og møta tykkum í staðbundnu arbeiðunum betri, har tit eru. Eg meti, at vit við hesum broytingum betri kunnu náa okkara endamál: at vekja upp trúarlívið og menna felagsskap teirra trúgvandi.

# Føroyar ikki áhugavert fyri SAS

**Skandinaviska flogfelagið SAS fer ikki at roynda eydnuna í Føroyum. Hetta sigur Jens Langergaard, sum er miðlastjóri hjá SAS**

FLOGVINNAN
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Ein kundi gitt, at SAS vildi royntat flogið leiðina millum Føroyar og Danmark, sum Mærsk millum onnur hevur roynt fyrr. Hetta avsannar tó Jens Langergaard fyri Sosialinum.

- Vit hava ikki ætlanir og heldur ikki áhuga í at royna okkum í Føroyum, sigur Jens.

Hann greiðir frá, at marknaðurin er ov lítil, og umstøðurnar ov vánaligar í Føroyum.

- Føroyar eru ein lítil marknaður. Vit eru nøgdir við okkara marknað í løtuni, og vit hava ikki áhuga í at fáa virksemi í Føroyum.

- Fortreytirnar hjá okkum at flúgva til Føroya eru ikki til staðar. Vit hava ikki nóg v flogfør, sum kunnu lenda í Føroyum. Tey flestu eru alt ov stór. Veðurlíkindini gera tað mangan trupult at lenda og koma úr Føroyum aftur, og vit kunnu ikki liva við, at okkara flogfør eru føst í Føroyum, sigur Jens Langergaard at enda við Sosialin.

*SAS hevur ikki áhuga í at flúgva til Føroya. - Umstøðurnar eru ov vánaligar, sigur miðlastjórin*




